# Vildu ikki fara niður um 12 prosent í lønarhækking

**Àrsins fyrsta verkfall er nú veruleiki og tað tað skal nógv til fyri at finna semju**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er rættiliga langt ímillum partarnar.

Tað er tann turra staðfestingin hjá Gunnleivi Dalsgarð.

Ársins fyrsta verkfall er nú veruleiki, eftir at allir 200 limirnir hjá Starvsmannafelagnum á Føroya Tele, løgdu arbeiðið niður í gjár.

Og formaðurin í Starvsmannafelagnum, sigur, at soleiðis sum støðan var, kundi tað ikki enda við øðrum enn verkfalli.

Tað er Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum samráðist fyri Føroya Tele og sáttmálin gekk út 1. mars og síðani hevur verið roynt at finna semju.

Tað hevur eisini gingið fínt, heilt til tey fóru at tosa um sjálva lønina, tí tá kom ordiliga stígur í.



*– Tað kostar at fáa frið í fleiri ár, men arbeiðsgevararnir vildu ikki spæla við, sigur Gunnleivur Dalsgarð*

Tað endaði við, at semingsmenninir vórðu tilkallaðir. Teir hava allar hesar seinastu dagarnar roynt at finna eina semju um lønuna, men tað eydnaðist ikki og sostatt fór meginparturin av arbeiðsfólkinum til hús seinnapartin í gjár.

### Friður má kosta eyka

Gunnleivur Daslgarð sigur, at upprunaliga varð tosað um ein vanligan eitt ella tvey ára sáttmála, men tað, sum limirnir í Starvsmannafelagnu kundu fáa í lønarhækking, varð so lítið, at tað kundi als ikki koma upp á tal.

– Tí var tað óvanliga hugskot fostrað at gera ein fýra ára sáttmála.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum sigur, at tað hevði givið arbeiðsfrið í heili fýra ár, men tað eigur sjálvandi at kosta nakað eyka.

– Tað eigur at vera dýrt at fáa tryggjaðan frið í fýra ár, men arbeiðsgevararnir vóru ikki sinnaðir at betala tann prísin.

Gunnleivur Dalsgarð sigur tað endaði við, at semingsmenninir løgdu eitt uppskot fyri partarnar, sum gav limunum í Starvsmannafelagnum eina hækking í løn og eftirløn upp á tilsamans 8,3% í einum fýra ára sáttmála.

– Hetta er alt ov lítið til at tað kundi koma upp á tal at góðtaka tað sigur hann.

Hann sigur, at skala talan vera um ein fýra ára sáttnála, vil Starvsmannafelagið ikki fara niður um eina hækking í lønum og eftirlønum upp á 12%.

Sostatt er langt ímillum partarnar, staðfestir hann.

– At fáa 8,3% í fýra ár, er heilt burturvið, leggur hann afturat, men vit mettu annars, at hetta var ein fyltur møguleiki at skapa støðufesti í einum longum áramáli.

Gunnleivur Dalsgarð heldur, at tað eru samráðingarnar við arbeiðarafeløgini um eitt ár, sum hava spøkt í høvdinum á arbeiðsgevarunum.

– Eg haldi ikki, at arbeiðsgevararnir í hesum føri hava hugsað nóg nógv um, hvat tænir Føroya Tele best. Eg haldi, at teir hava meiri hugsað um at at halda støðið so lágt sum gjørligt fyri at kunna brúka hendan sáttmálan sum fyrimynd, tá ið samráðingarnar vera við arbeiðarafeløgini um eitt ár.

Tað skerst heldur ikki burtur, at Arbeiðsgevarafelagið hevur víst á støðið í teimum sáttmálum, sum eru gjørdir og tí vildu teir ikki fara uppum 8,3% í lænarhækking.

Men tað góðtekur Starvsmannafelagið ikki.

– Sáttmálarnir, sum eru gjørdir, eru gjørdir undir heilt øðrvísi fortreytum og tað er søga. Nú er støðan í samfelagnum ein heilt onnur, tí stór framgongd hevur verið í búskapinum og tað eigur sjálvsagt at síggjast aftur í sáttmálunum, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

## Góðtóku eina høga lønarhækking

**Arbeiðsgevarafelagið harmast um, at Starvsmannafelagið fór í verkfall, heldur enn at góðtaka eina lønarhækking**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Føroya Arbeiðsgevarafelag var sinnað at góðtaka lnarhækkingina, hóast hon er hægri enn í sáttmálum, sum eru gjørdir.

Tað sigur Johan Páll Joensen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Tí harmast hann um, at Starvsmannafelagið ikki vildi góðtaka semingsuppskotið, men heldur koyrdi alt fólkið hjá Føroya Tele til hús.

Nú samráðingar hava verið um nýggjan sáttmála hjá teimum limum, sum Starvsmannafelagið hevur hjá Føroya Tele, er tað Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum samráðist fyri Føroya Tele.

Tað endaði við, at semingsmenninir komu upp í. Eftir at hava sitið saman við pørtunum í tveir dagar, løgdu teir fyrrapartin týsdagin eitt uppskot fyri partarnar.

Talan var um ein fýra ára sáttmála, sum hevði givið limunum í Starvsmannafelagnum eina hækking í lønum og eftirlønum upp á tilsamans 8,3% hesi fýra árini.

– Føroya Arbeiðsgevarafelag valdi at siga ja til semjuna, sjálvt um hon gav meira enn tað støði sum er lagt á privata arbeiðsmarknaðinum, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag í einum tíðindaskrivi.

Felagið sigur, at tey bæði fyrstu árini, hevði sáttmálin kostað Føroya Tele 2,6 % og hetta svarar til hækkingina í semjunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Arbeiðsgevarafelagið vísir á, at tá á sáttmálin varð gjørdur við arbeiðarafeløgini í fjør, løgdu bæði arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir dent á, at hetta støðið skuldi haldast fyri allan arbeiðsmarknaðin.

– Semjan sum nú varð løgd fyri partarnar í sambandi við Føroya Tele, lá á sama støði sum tvey ára sáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum og sostatt 0,2 % hægri enn semjan við arbeiðarafeløgini.

– Men í hesum føri er talan um ein fýra ára sáttmála og vit vita at tað kostar at gera sáttmálar sum røkka so nógv ár fram sigur Johan Páll Joensen.

Hann leggur afturat, at varð hendan semjan góðtikin, var Arbeiðsgevarafelagið til reiðar at leingja aðrar sáttmálar samsvarandi hesum.

# Nógv arbeiði liggur lamið

**– Nú ein stórur partur av starvsfólkunum á Føroya Tele eru farin í verkfall, fer tað at merkjast, men skuldi álvarlig brek tikið seg upp, væntar stjórin at fáa undantaksloyvi**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú 200 starvsfólk á Føroya Tele eru farin í verkfall, er tað nakað, sum sæst.

Eini 50 eru eftir til arbeiðis á Føroya Tele og tað eru fólk, sum ikki eru limir í Starvsmannafelagnum, men sum eru verkfrøðingar, búskaparfrøðingar, løgfrøðingar o. s.fr.

Men Andrass Róin, stjóri á Føroya Tele, staðfestir, at tað sjálvandi fer at merkjast, at ein so stórur partur av starvsfólkunum eru í verkfalli.

Hann sigur, at tað mest sjónliga fyri vanligu viðskiftafólkini, er, at allar telebúðirnar kring landið eru stongdar.

So leingi verkfallið er, verður heldur ikki koyrt runt til fólk at seta telefonir og annað til.

Samstundis eru allar telefontænastur stongdar og tað rakar nummarkall, hjálp til internet umvegis telefon o.s.fr.

Andrass Róin sigur, at minni brek verða heldur ikki umvæld og varar verkfallið leingi, kann tað henda, at tað heldur ikki fer at bera til at seta rokningar út.

Men varar verkfallið leingi, kann tað eisini fáa meiri álvarsligar avleiðingar, tí so kann tað raka viðlíkahaldið og tað er sera óheppið.

Men stjórin væntar avgjørt, at taka størri brek seg upp, fer tað at bera til at fáa undantaksloyvi til at umvæla tey.

Eitt nú væntar hann avgjørt, at Føroya Tele hevði fingið undantaksloyvi til at kalla fólk inn at umvæla eitt brek, sum kanska leggur eina heila bygd í telefonloysi, tí tað hevði ikki tænt nøkrum endamáli hjá hvørgum parti at lagt alt lamið.

### Avoldað og primitivt

Nú verkfall er á Føroya Tele, er hetta ein støða, tey ikki eru von við, tí tað er ikki ofta, at tað kemur fyri.

– Men Andrass Róin sigur, at hetta er ein støða, sum Føroya Tele onga ávirkan hevur á, tí tað er Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum samráðist fyri Føroya Tele.

–Hetta er ein ósemja, sum er ímillum Starvsmannafelagið og Arbeiðsgevarafelagið, har Føroya Tele er blivin gísli.

Av tí, at Føroya Tele onga ávirkan hevur á støðuna, vil hann heldur ikki siga nakað um semingsyppskotið yvirhøvur.

Men hann ásannar, at tað er sera óheppið, at verkfall er á stovninum.

– Tað er avoldað og primitivt at hava verkføll sum hesi í einum framkomnum samfelagið og so leingi støðan á arbeiðsmarknaðinum ikki broytist, kunnu vit gloyma alt um búskaparliga menning og endamálið í visjón 2015, leggur hann afturat. Tað kunnu vit sleppa øllum tankum um, so leingi samfelagið og stór feløg kunnu verða løgd lamin av verkføllum í tíð og úrtíð.

– Tað ger kappingarførið hjá føroyskum vinnulívi og føroyska búskapinum verri, leggur hann afturat.

### Mugu sleppa undan

Hann sigur, at hetta ger eisini kappingarstøðuna hjá Føroya Tele verri, enn hon eigur at vera mótvegis teimum, sum tey kappast við.

Hann heldur, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum mugu læra seg at tosa betri saman.

Andrass Róin heldur, at í øðrum londum hava tey ásannað, at ongin fær nakað burturúr ósemjum á arbeiðsmarknaðinum og tí eru verkføll ikki so vanlig har.

– Hetta er heilt avgjørt ein støða, sum vit fara at taka upp innanhýsis tá ið verkfallið er av,

Føroya Tele má skipast so, at ósemjur á arbeiðsmarknaðinum ikki ávirka stovnin so illa, sum nú, tí tað sigur seg sjálvt, at vit kunnu ikki liva við at kunna vera rakt av verkfalli í heilum.

Hvat Føroya Tele kann gera við tað, hevur hann onki boð upp á enn.

Men hann heldur, at eitt úrslit av hesum kann vera, at arbeiðsuppgávurnar á Føroya Tele í framtíðini fara at vera býttar øðrvísi ímillum starvsfólkið, enn tær eru nú so at Føroya Tele ikki verður so ávirkað av verkføllum.

– Vit ætla ikki at gera fólki til tænastufólk, men vit fara at kanna, hvørjir møguleikar, eru, sigur Andrass Róin.



*– So leingi hetta skilið er á føroyska arbeiðsmarknaðinum, kunnu vit gloyma alt um búskaparliga menning og visjón 2015, sigur Andrass Róin, stjóri í Føroya Tele*